VALGREINAR

Føroyskur tónleikur luft undir veingirnar!

Rani Nolsøe
valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum

Skal føroyskur tónleikur fáa luft undir veingirnar á altjóða marknaðum, er neyðugt við einum føroyskum/altjóða joint venture samstarvi. Tí, sum altíð hjá eini lítlari, men knáari tjóð sum okkara, so mugu vit duga væl at samstarva við útheimin

Vit tónleikarar eiga tí sum skjótast at gera eitt upplegg um, hvussu vágafúsur kapitalur fæst í eitt venture felag, sum við økonomiskari styrki og við tónlistarligari og altjóða ekspertisu í leiðsluni, skal gera tað áhugavert og álítandi hjá altjóða útgávufeløgum at kasta saman við okkum, at produsera og promovera føroyskan tónleik á handilsligum grundarlagi.

Við hesum uppleggi skal komandi løgting fáast at viðurkenna tónleik sum eina potentiella eksportvinnu og vera við til, yvir eitt áramál, at játta grundfæið í venture felagið. Við hesum pengunum skal felagið fáa Framtaksgrunnin og Notio áhugaði at koma við tilsvarandi upphæddum. Kapitaliserað, vildi tað givið eitt áhugavert útgangsstøði at fari eftir privatum íleggjarum í Føroyum og avgjørt øðrum londum við.

Á henda hátt fáa vit við føroyskum venture kapitali eitt sterkt útgangsstøði at fara út og bjóða altjóða útgávufeløgum at satsa - saman við okkum - uppá føroyskan tónleik.

Eg trúgvi, at eitt slíkt føroyskt/altjóða samstarv er neyðugt. Tað er einasti realistiski máti at fáa økonomisku styrkina og neyðugu ekspertisuna at fáa potentialini í føroyskum tónleiki umsett til eina áhugaverda eksportvinnu. Fyri Universal og øll hini, er tað flintrandi líkamikið, hvar tónleikurin, teir promovera, verður skaptur.

Í 1998 ringdi Finnbogi Arge, nýinnsettur og visionerur vinnumálaráðharri, til mín og bað meg seta gongd á eina verkætlan, sum skuldi fáa føroyskan tónleik út um landoddarnar.

Eg fór beinanvegin til verka, gjørdi eitt upplegg, sum í høvuðsheitum innihelt omanfyri standandi strategi at skapa eitt føroyskt/altjóða samstarv, sum var fórt fyri at produsera og pormovera tað stóra tilfeingið av føroyskt komponeraðum tónleiki.

Eftir nakrar fundir í Tinganesi gjørdist tað tó greitt, at umsitingin í vinnumálastýrinum ivaðist stórliga. Tí, skuldu pengar brúkast uppá slíkt, so máttu øll hava somu atgongd, vóru boðini. Og á hesum 'antin øll ella eingin' altari steðgaði tað initiativið.

Men til alla gleði hava vit álíkavæl sæð eina sanna kollvelting í okkara tónleikalívi! Hyggið at kolosalu útgávunøgdini og breiddini í henni, hækkandi tekniska støðinum hjá tónleikarum og at umfatandi lag- og tekstsmíðinum.

Altjóða er føroyska umboðanin í løtuni eisini omanfyri okkara statistisku sannlíkindi.

Hetta er alt úrslit av stóra innsatsinum hjá tónleikarunum sjálvum, Prix Føroyum, musikskúlaskipanini og tøknniligu menningini.

Tí er tað trupult at koma til aðra niðurstøðu, enn at føroyskur tónleikur er ein potentiel vinna. Men enn er hon bert potentiel, tí vit hava ikki fingið ta somu økonomisku, sum listarligu menningina innan okkara listargrein.

Hetta er eitt mál, sum lítla nyttu ger á valskránni hjá c-vitaminunum eina, men stóra nyttu í einum komandi samgonguskjali, um Tjóðveldisflokkurin fær ávirkan.

Veljið framtíðina - veljið Tjóðveldisflokkin!

Frásiga sær frumburðarrættin

Heini O. Heinesen
løgtinsmaður og valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum

Sambansflokkurin berjist sum úlvur á skóð fyri at innlima Føroya land inn í EF sum danskan ríkislut. Teir vilja eisini fyri einhvønn prís fáa føroya fólk at frásiga sær frumburðarættin til sítt egna føðiland, um teir fáa magt, sum teir hava agt.

Tjóðveldisflokkurin bjóðar seg aftur fram at stýra landinum aftaná valið, tað gera vit við góðum treysti.

Tí vit hava alit á okkara landi, og okkara ovurríka havi, sum skaparin í gávumildni sínum hevur givið føroysku tjóðini -og vit líta hesum sama Skapara til.

Tað kann tí tykast løgi, at tað skulu finnast politikara í Føroyum ár 2004, sum eru til reiðar at frásiga sær frumburðarættin til okkara føðiland.

Hesir vilja fyri ein hvønn prís innlima Føroya land í EF sum danskan ríkislut.

Tað eru hesar somu politikarar, sum bevíst royna at taka mótið frá føroyska fólkinum.

Upp móti hesum armóðs politikki, setur Tjóðveldisflokkurin stevnu sína.

Hvat var tað, sum gjørdi at okkara samfelag reisti seg aftur aftana kreppuna?

Tað var, hugsjónin um eina sjálvberandi føroyska vinnu, uttan studning og veðhald, sum hevur gjørt, at vit í dag kunnu tosa um ein tryggan føroyskan búskap.

Hetta hevur skapt møguleikan at betra um okkara sosialpolitikk, skúla og mentanar politikk, samferðslu og -íløgupolitikk, sum byggir á føroyskan búskap.

Við hesu hugsjón sum grundarlag er tjóðveldisflokkurin til reiðar at samstarva við allar flokkar.

Heimasíða mín:
http://heima.olivant.fo/~hoyh/

Fólkatkvøðu um etisk mál?

Jóhan Petur Johannesen
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Eitt ið hevur veri nógv frammi í valstríðnum eru etiskmál, og tað er bara gott at vit fáa orðaskifti um hesi mál í okkara landi. Men eitt ið hevur verði sagt aftur og aftur er, at talan eru um ein persónliga støðutakan til málið. Sjálvur eri valevni hjá Sambandsflokkinum, og har hava eg frítt standa í hesum málum, og tað er ongin loyna, at eg byggji mítt lív á ta kristnusiðalæruna, og eg gleðist nógv um at tað eru fólk í øllum flokkum ið gera tað sama,

Tí hevið tað verði uppá sítt pláss at vit fingu eina fólkaatkvøðu um tey etiskumálini, tað er jú ikki óvanligt, at í londum har átrúnnaður hevur ein tiðandi leiklut, at fólki kemur til orða, vit havi dømi úr okkara egnu søgu fólkatkvøðu í 1907 og 1973 um rúsdrekkamálið.

Vit kundu siga at vit hava fýra mál til fólkaatkvøðuna, at fólk fýra seðlar við hesum spurinngnum

JaNei
1. Skulu vit hava fría fosturtøku í Føroyum
2. Skulu vit hava lóg um skrásett parlag í Føroyum
3. Skulu vit hava fría rúsdrekkasølu í Føroyum
4. Skal javnstøðulógin avtakast

Fáa eg tín stuðul 20 jan. Fari eg at arbeiða fyri at hesi mál koma til fólkaatkvøðu, tað hevið gjørt tað lættari at rikið politikk í Føroyum um fólki talaði fyri seg í omanfyrinevdum málum, og hvør veit tá hevið uttan iva staði saman við onkrum, hvar vit í dag standa ímóti hvørjum øðrum í fullveldismálum, og øvugt.

Kommunistiskari enn Kuba

Kaj Leo Johannesen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Tað er alneyðugt, at vit fáa styrkt vinnulívið, soleiðis at tað klárar seg í kappingini við tað almenna. Tí ræður ikki minst um, av vit tálma galoperandi útreiðsluvøksturin í almenna sektorinum.

Eitt, sum vit eiga at hugsa meira um, er at privatisera almennar fyritøkur. Um vit hyggja at samlaða eginpeninginum í føroyskum partafeløgum, so er hann 4,3 milliardir krónur, harav 1,9 milliardir eru almenn ogn.

Harumframt eigur tað almenna eginpening uppá 1,9 mialliardir krónur í feløgum, ið ikki eru partafeløg, so hervið er samlaði almenni eginpeningurin 3,8 milliardir ella 61% av samlaðu potentiellu partafeløgnum.

Hetta er ræðandi, um vit samanbera við tað kommunistiska Kuba, sum hevur ein almennan ognarpart uppá umleið 40 % í almennum feløgum og grunnum.

At vit mugu fara undir privatisering av almennum fyritøkum, verður undirstrikað av, at vit hava heimsmet í almennum stuðli til vinnulívið, umframt at vit hava europeiskt met, tá talan er um skattatrýst.

Sjálvt um vit sjáldan hoyra um at vilja avtaka eitt heimsmet ella evropeiskt met, so vil Sambandsflokkurin avtaka henda ivasama heiður, og fáa eitt normalt vinnulív og eitt lægri skattatrýst.

Eisini er tað neyðugt, at vit taka upp spurningin um miðsavnan kontra økismenning. Tunlar, brúgvar, skip og vegir skulu binda Føroyar saman í eina eind, soleiðis at hetta skapar javnbjóðis kappingarføri á øllum økjum.

Miðstaðarøkið og útjaðarin hava brúk fyri hvørjum øðrum og harnæst hevur tað týðning at arbeiðsmegin kann flytast millum øki í landinum.

Tí bjóðar Sambandsflokkurin seg fram at fáa skapt veruligar karmar um vinnulívið, uttan tó at talan skal vera um almennan studning, so tað kann standa á egnum beinum, bæði viðvíkjandi kapitali og umstøðum at virka undir.

VALGREINAR

KonTórshavn má tódna!

Dánial Petur Hansen
Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

At tað almenna er vaksið alt ov skjótt tey seinastu árini eru flest øll samd um, eisini tey sum starvast innan tað almenna.

Ein av høvuðsorsøkunum til at so hevur verið er, at vit ikki hava verið nóg góð til at tikið eitt mennandi og uppbyggjandi kjak um hvørjar uppgávurnar hjá tí almenna skulu verða og hvussu hesar eiga at verða loystar - ein tillaging til føroysk viðurskifti hevur als ikki verið framd.

Tosað hevur verið um at framt rationaliseringar. Eg sjálvur havi heldur hug til at taka fram hugtakið effektiv resourceallokering. Hetta er eitt hugtak, sum tað privata vinnulívið kennir væl til, og sum vísur á, hvussu avgerandi tað er, at vit nýta okkara tilfeingi rætt.

Fyri tað almenna kundi ein spurningur m.a. í hesum førum verið, um vit er nóg góð til at fáa nóg mikið burtur úr okkara væl útbúnu og dugnaligu starvsfólkum.

Alt ov stórur partur av okkara almenna virksemi er eisini í høvuðsstaðnum. Arbeitt eigur at verða nógv meira miðvíst við at fáa gjørt tað møguligt at almenn arbeiðspláss kunnu verða spjadd runt landið.

Eg eri onga løtu í iva um, at borgarin í fleiri førum vildi kunna fingið eina betri tænastu, við tað at tænastan nú lá nærri borgaranum.

Talan er her eisini um økismenningar- og útjaðarapolitikk, sum er við til at stimbra og styrkja økir uttanfyri KonTórshavn.

Ein nýggj og virkin byrjan við Sjálvstýrisflokkinum er tann gongda leiðin. Gott val!

Sjálvsstýrisflokkurin ein fullveldisflokkur

Jaspur Vang
valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Tá báðar tær seinastu fullveldissamgongurnar vórðu skipaðar, legði Sjálvstýrisflokkurin saman við Fólkaflokkinum og gjørdist jokarin, sum fekk fullveldiskabaluna at ganga upp. Tí hevur Sjálvsstýrisflokkurin fulla ábyrgd av førda búskaparpolitikkinum og fullveldistilgongdini.

Torfort at ríða á tveimum hestum.

Alt meðan fullveldisbaljan hevur tikið vatn inn og at enda sakk, hevur Sjálvstýrisflokkurin ryggsvomið og sagt seg vera ivasaman í spurninginum um fullveldi og yvirtøkur. Hóast tað hevur hesin flokkur saman við Miðflokkinum stuðla Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum í førda fullveldispolitikkinum og harvið tí førda búskaparpolitikkinum.

Eins og Miðflokkurin roynir Sjálvstýrisflokkurin at leggja seg á miðjuna í føroyskum politikki. Boðskapurin verður av somu orsøk so ullintur, at sjálvt innanhýsis í flokkinum er fatanin av boðskapinum ymisk og hevur fórt til opið stríð í flokkinum.

Økismenningarmál

Tað eydnaðist fyri 1 1/2 ári síðani Sjálvstýrisflokkinum at fáa landsstýrismannin í Økismenning og Oljumálum. Hvat Økismenning viðvíkur lovaði nevndi landsstýrismaður at lesa sonevnda Økismenningarálitið. Síðani hoyrdist einki aftur um økismenning. Helst er landsstýrismaðurin farin á glið í allari oljuni.

Niðurstøða

Uttan ein greiðan politiskan boðskap hevur ein politiskur flokkur einki trúvirði.

Vandin við hesum smáu flokkum er, at teir mangan fáa alt ov stórt politiskt vald í mun til undirtøkuna millum veljararnar. Soleiðis eru smáa flokkarnar ein veikleiki í fólkaræðisligu skipanunum.

Sjálvsstýrisflokkurin gjørdi tað møguligt at skipa fullveldissamgonguna eftir valið í 1998, eins og Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin gjørdu tað møguligt at skipa seinnu fullveldissamgonguna fyri 1 1/2 ári síðani.

Seinastu tvey valskeiðini hevur Sjálvsstýrisflokkurin soleiðis verið "eitt filial" undir Fólkaflokkinum.

Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin vóru við til at skerja blokkstuðulin og hava verið við til at fyrireika yvirtøkurnar av løgreglu, rættarskipan og flogvølli.

Nú val er útskrivað, er tað ov seint at skifta hest.

Vónandi eydnast tað ikki Sjálvsstýrisflokkinum at renna undan ábyrgd tann 20. januar.

Tryggar fíggjarligar karmar

Lasse Klein
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Tá ein fíggjar- og búskaparpolitikkur verður lagdur til rættis, er neyðugt at leggja dent á, at almenna støðið er hóskandi til føroyska samfelagið. Tær tænastur, íð tað almenna skal veita landsins borgarum, skulu vera í tráð við okkara søgu og mentan, og tí skal:

- fíggjarorka landsins verða grundað á tað vinnuvirði, sum samfelagið skapar,
- landsumsitingin gerast einfaldari, soleiðis at hon hóskar til føroysk viðurskiftir,
- allar íløgur verða langtiðarraðfestar,
- løgtingsfíggjarlógirnar skulu javnviga í mest møguligan mun.

Skattaviðurskiftir og onnur gjøld

Eftir mínum tykki er neyðugt at arbeiða fyri stigvíst at avtaka progresiva skattastigan og avtaka flest allar frádráttir, og stuðlar við tí endamálið at lækka skattaprosentið, og herundir eisini marginalskattaprosentið. Skattapolitikkurin skal elva til øktan arbeiðshug, rættvísa skatting av giftum og ógiftum, einfaldari umsiting og skal ikki elva til óneyðugari lántøku. Endamálið má í samráðingum millum fleiri flokkar verða at røkka einum skattaprosenti fyri allar borgarar sum kundi í mesta lagið ligið uppá t.d. 30%. Talan kann tí verða um at breiðka skattagrundarlagið, men frávik mugu gerast fyri ávísar samfelagsbólkar. Eisini eigur MVG skipanin at verða endurskoða heilt av nýggjum. Neyðugt er at tryggja:

- at lækka skattatrýstið á seinastu vunnu krónuna,
- at tann einstaki skal føla, at hesin fær nakað fyri goldnaeisini hetta vera við til at lækka persónliga skattin skattin,
- rationaliseringar skulu gerast og við tíðini skal eisini hetta vera við til at lækka persónliga skattin.

Hvørvisjón Javnaðarfloksins

Klæmint Olsen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy

Veljarakanningin spáar Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum sigur á valinum 20. januar. Vert er tó at geva gætur, at kanningin var gjørd, áðrenn tað alment kom fram, at Javnaðarflokkurin hevði skift ham. Gloymd var samtyktin frá 17. oktober 2003: "Tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum".

Javnðarflokkurin sigur í samtyktini:

- at ein sjálvstýrissátt máli skal avloysa heimastýrislógina
- at staðfest verður, at føroyingar eru ein tjóð og Føroyar eitt land
- at Føroya løgting og landstýri skulu vera evsta vald í øllum føroyskum viðurskiftum
- at sáttmálin ásetur, at Føroyar kunnu taka seg úr samveldinum, og
- at sáttmálin skal kunngerast ST, so hann fær altjóða gildi.

Men alt var eitt spæl fyri gallerínum. Ein hvørvisjón.

Á fundinum í læraraskúlahøllini í farnu viku kom hetta undan kavi. Púra greitt gjørdist tað tó ikki, fyrr enn Jóannes Eidesgaard var "Í andgletti" í sjónvarpinum. Sjálvstýrimálið var nú vorðið so "sekundert", at tað illa kundi takast upp á tungu.

Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins er eisini ein farin søga. Lisbeth Petersen hevur so dyggiliga punkterað, at talan er um ein „nýggja stjórnarskipan" fyri Føroyar, sum tað annars stendur í valskránni.

Allir hóvliga hugsandi sjálvstýrisveljarar áttu tí at hugsað seg minst tvær reisir um, áðrenn teir settu krossin við hesar báðar flokkar.

Eldraøkið

Haldóra Ranghamar
valevni Sambandsflokkurin í Eysturoy

Eldraøkið verður tikið fram til hvørt val - lyfti, sum ikki blíva til veruleika.

Tørvurin eftir mannsømuligum korum hjá okkara eldra ættarliði er rættuliga stórur.

Hóast stóran búskaparvøkstur tey síðstu árini, hevur ov lítil áhugi verið sýndur teimum eldru. Nationalistiskar hugsjónir er komnar í fremstu rað.

Hóast eldraøkið er ein landsuppgáva, so hava fleiri kommunur sæð seg noyddar sjálvar at gerða nakað við hesar umstøður og hava so tikið stig til at bygt sambýlir.

Avvarðandi eru mangðan í dýrastu neyð, royna eftir besta førimuni at hjálpa, eru noydd í ávísum førum at fara úr arbeiði, fyri at taka sær av sínum nærmastu.

Somuleiðis hava heimaræktirnar tað heldur ikki latt tá tær fara frá teimum, sum liggja hjálparleys.

Tí vil sambandsflokkurin bjóða seg fram og vísa ábyrgd og virðing fyri okkara eldru og virka fyri atveita teimum tað tænastu, sum nú einaferð er best fyri hvønn einstakan, um tað so er í heiminum ella á stovni.